Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 11. november 2005



**Týsdag 15. kl. 20.00**

SVF

**Harry Potter og eg - Portrett av J.K. Rowling**
Nú fjórði Potter-filmurin, "Harry Potter and the Goblet of Fire", verður frumsýndur, sæst hetta aftur á nøkrum rásum. Tv3 sendir sunnukvøldið "Harry Potter og gandasteinurin". Og Dr2 heldur temakvøld, ið snýr seg um Harry Potter. Harímillum er samrøða við "mammu" Potter - J.K. Rowling. Hon sigur m.a. frá um hvussu hon fann uppá søguna.





**Mikudag 16. kl. 23.05**

**200 - konsert á Margarinfabrikkini**
Punkbólkurin 200 hevur tvær fløguútgávur á baki, serliga tann seinasta, Viva la Republica, varð væl móttikin av føroysku áhoyrarafjøldini. Bólkurin hevur annars júst luttikið á íslendska tónleikafagnaðinum Iceland Airwaves. Har fingu teir nógva góða umtalu. SvF sendir aftur hesa vikuna eina konsert hjá einum føroyskum tónleikabólki.

**Sunnudag 13. kl. 20.00**

SVF

**Ymisk lív 2**
Ymisk lív hittir hesaferð tvey ung pør við ógvuliga ymiskum lívsstíli og lívsáskoðan. Alice og Jónhard búgva á Skála og blivu gift sum heilt ung. Tey eru trúgvandi og aktiv í samkomuni í Skálabotni, Kelduni. Tey raðfesta eitt róligt familjulív høgt og hjá teimum er Guð nr. 1. Margit og Andrew, harafturímóti upplivað lívið øðrvísi.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**